BP keypir Veba

– Hvalaveiða er føroyskt mál, sum BP ikki á nakran hátt leggur seg út í sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri

OLJA OG GRIND
Jan Müller

Týska oljufelagið, Veba Oil & Gas, sum nógv rumbul hevur verið um í seinastuni í sambandi við grindadráp og felagsskapin hjá Paul Watson, Sea Shepherd, verður skjótt í hondunum á risastóra bretska oljufelagnum BP. BP hevur gjørt eina avtalu um at yvirtaka 51% av partapeninginum í VEBA, men endaliga góðkenningin frá bretska kappingarráðnum um handilin fyriliggur ikki enn upplýsir Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum. – Tí hevur BP enn onga ávirkan á, hvussu felagið verður rikið svarar Hjarnar Djurhuus, tá vit reisa spurningin um grindadráp og støðuna hjá Veba.

Hjarnar Djurhuus váttar annars, at eisini BP fekk bræv frá Sea Shepherd felagsskapinum um at fáa stuðul í royndunum at steðga grindadrápinum. – Hvalaveiða er føroyskt mál, sum BP ikki á nakran hátt leggur seg út í var svarið frá BP, sum ístaðin bað Sea Shepherd venda sær til teir altjóða felagsskapir, sum arbeiða við slíkum málum.

Hjarnar Djurhuus upplýsir annars, at tá teir fingu umrøddu áheitan setti BP seg alt fyri eitt í samband við Kate Sanderson, sum tekur sær av slíkum málum í Tinganesi. – Har fingu vit eina sera greiða og professionella frágreiðing um alt málið og eri eg tí eisini sannførdur um, at einasta gongda leið er tann hjá føroysku myndugleikunum, nevniliga upplýsing.

BP og Statoil boringarnar lidnar um mánaðarskiftið

Eftir øllum at døma verður tað dagurin 1. september, tá føroyingar fáa nakað ítøkiligt at vita um tær báðar boringarnar, sum í løtuni eru á landgrunninum

OLJULEITING
Jan Müller

Tað gongur eftir øllum at døma ikki so skjótt við boringini, sum BP hevði roknað við. Mett varð, at boringin fór kanska at verða liðug í hesi vikuni, men nú upplýsir Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP, at boringin verður ikki liðug fyrr enn um mánaðarskiftið augustseptember. – Eg kann einki siga um úrslitið annars. Tit mugu bíða eftir útmelding frá Oljumálastýrinum er standard svarið vit fáa, tá spurt verður um úrslit.

Sosialurin skilur tó, at ein orsøk til, at tað gongur seinni enn ætlað, er tann, at borurin er komin so langt niður í undirgrundina, at hann rætt og slætt borar seinni. Av onkrari orsøk er tyngri at bora á so stórum dýpi. Borurin skal 4700 metrar niður og eftir øllum at døma er farið niður um teir fýra kilometrarnar. Nakrir hundrað metrar eru eftir.

Søgurnar og fyri tað gitingarnar, sum ganga í føroyska samfelagnum, eru annars nógvar. Tær ganga frá, at BP skal hava funnið olju ella gass, til at BP skal einki hava funnið annað enn sokallað oljuspor. Kemisk evni skulu verða flutt út á skipið, evni, sum bert verða brúkt, um olja er funnin, gass skal verða brent av umborð eru bert nakrar av søgunum. Aðrar siga beint tvørturímóti, at BP fólkini eru vónsvikin, tí har var einki í tí fyrsta strukturinum, sum størstu vónir vóru til. Nú verður so álitið sett á sjálvt botnmálið á teimum 4700 metrunum. BP byrjaði boringina 23. juli, tvs. at teir hava borað í góðan mánað.

Statoil borar eisini við sama lag. Teir hava borað síðani 11. juli tvs. í umleið seks vikur. Statoil skuldi longu havt rokkið sínum fyrsta máli, men einki er komið út um nakað úrslit. Eftir øllum at døma hevur Statoil tvey ella trý mál (targets) í síni arbeiðsskrá. Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil sigur, at boringin gongur eftir ætlan. Teir halda framvegis fast við, at 1. september kunnu teir koma við fyrstu úrslitunum. Eftir tí Sosialurin kann rokna seg fram til, so hava tey á Sovereign Explorar borað einar 3500 metrar, tvs. at einir 700 metrar eru eftir at bora, sami teinur, ið BP eftir øllum at døma skal bora aftrat. Við øðrum orðum fara bæði feløgini at røkka sínum endaligu og seinastu málum um góða viku. So upprunaligu útmeldingarnar frá bæði Statoil og BP um 1. september fara helst at halda.

F r y st rst rv l v kk t lf r r k rt n,
yl u l st nn n ll v nnu k r
V t tv s n
l st kk r • kk n • T • M rk r • Et k tt r
Kn v r • K tl r • H vur • H n sk r • Sv ntur
Ym sk t l t l n n • n r s vn • n n r vn
l tt r • v n t l vn n v kk t lf r
… s lv n t l st r s n
FARPACK
DANAK
DNV
www.f r ck.c m